SKÚLIN
Á GILJANESI

## Lærarastørv í Skúlanum á Giljanesi skúlaárið 2024-2025

**Hesi lærarastørv eru leys at seta í Skúlanum á Giljanesi frá 1. august 2024 at rokna:**

- Tvey tíðaravmarkað fulltíðarstørv fyri lærarar í farloyvi skúlaárið 2024-2025
- Eitt tíðaravmarkað fulltíðarstarv vegna avlopstímar og niðursetta tíð skúlaárið 2024-2025
- Eitt tíðaravmarkað starv vegna avlopstímar (uml. 0,80) skúlaárið 2024-2025
  Endaliga tímatalið verður ásett 1. septembur 2024

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**

- Hava lærarаútbúgving
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi
- Eru fúsir at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan
- Eru stundisligir og nærlagdir
- Tola broytingar
- Hava góðar KT-førleikar

**Okkum tørvar:**

- Lærarar, sum kunnu undirvísa í: Heimstaðarlæru, landalæru, kristni, lívfrøði, støddfrøði í miðdeild, alis- og evnafrøði, náttúru/tøkni, donskum, ítrótti, svimjing og smíð.
- Lærarar, sum vilja átaka sær flokslæraraleiklut í miðdeild

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Barnaváttan er kravd.

**Umsóknir:**
Umsóknir, við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu sendast sum PDF-fíla til sag@skulin.fo í seinasta lagi **fríggjadagin 14. juni kl. 17.00.**

Nærri fæst at vita um størvini hjá Annbritt Toftegaard á tlf. 794425.

**Um skúlan:**
*Í skúlanum á Giljanesi ganga uml. 300 næmingar í 1. - 10. Flokki. Tað starvast 36 lærarar, námsfrøðingar og stuðlar í skúlanum.*